LM-099/2023

Fylgiskjal 35

Sunnbøur tann 22.02.2024

Viðmerkingar til uppskot til burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)

- Markatalsbygdin Sumba er triðstørsta markatalsbygd í Føroyum, og hava okur bygdar gøtur sum eru nógvar, nógvar kilometrar tilsamans. Sumbiar kommuna sær seg als ikki føra fyri, at seta allar hesar kilometrar í ferðavinnu stand.
- Sumbiar kommuna metir hesa lóg, verða til ampa fyri ognarar og festara sum missa sín ognarrætt til jørðina, og tekur grundarlagið undan teirra virksemið.
- Hendan lóg kemur at hava stóran fíggjarligan ávirkan á Sumbiar kommunu, har kommunan skal við lóg halda ferðavinnuna nøgda, enn einaferð kemur Landið við eini lóg, sum er ein fíggjarligur smeitur fyri Sumbiar kommunu. Her er sama lóg galdandi fyri allar kommunur, men peningurin/býtið samsvarar ikki við skildur.

§ 2. Stk. 2 Til hvønn verður goldið, hvat er gjaldið, hvør setur gjaldið á? Stk. 2 Brúkarin? Festarin, ella eigarin av festibrævinum.

§ 3. Takið als undir við hesu orðing, "er **einum og hvørjum frítt** at ferðast uttangarðs og framm við strondini."

§ 4. Stk. 2. Brúka bátabrúgvar og tílíkt, um hettar ikki er eigara ella brúkara til skaða ella ampa. Sumbiar kommuna hevur brúkt milliónir uppá bátabrúgvar, skal nú hvør Hanus og Janus brúka hettar, okkarar borgarar gjalda eitt ársgjald fyri báta brúgva plássini. Stk. 4. "Ikki er loyvt at hava hund við sær uttangarðs uttan í sambandi við landbúnaðarvirksemi." "leiting og bjarging" kundi komið afturat, og skal landsstýrismaðurin nú gera av, um eigari og festari hava hund við í sín hagi.?

Stk. 5. Hvussu? Um tey ikki akta, hvat so? Her verður sterkt fyrilit tikið til ókendu standardavtaluna frá Landsstýrismanninum, er hendan líka fyri allar Føroyar?

§ 5. Stk 2. og Stk. 3 Taka als ikki undir við hesum.

§ 6. Hesin paragraffir er ein stór útreiðsla fyri kommununa, her fylgir ikki gjald og útreiðsla saman, Sumbiar kommuna hevur eitt fólk í ½ starvið (borgarstjórin) og eitt fólk í ¾ starvið (kommunuskrivarin) Okur hava ongan livandi kjans at liva upp til hesa lóg, sum áleggur kommununum eina stóra eykaútreiðslu.

Stk. 3. Koma ikki at klára, og koma ikki at gera hesa ætla. Hava ikki tíð og orku til enn eina uppgávu áløgd frá Landið til kommunu.

§ 8. Kunna undir ongum umstøðum góðtak hesa eyka útreiðslu sum verða lagdar á kommununa/ar. Ferðavinnan er ikki ein kommununal uppgáva, men ein landsuppgáva.

Stk. 3. Hvør skal siga, at hesar eru gott nokk hildnar? Landsstýrismaðurin, ferðafólkini?

§ 9. Alt ó ógreitt, allir paragraffurin sum hann er, hvør setir sektina á, tað er bara politiið sum kann geva sekt/bót.

§ 10. Taka ikki undir við hesum, her verður bert tikið atlit fyri landbúnaði, og ongum øðrum, eigarin kann hava gjørt stórar íløgur í hettar økið uttan um landbúnaðin.

§ 11. Her hevur tann staðkendi meiri kunnleika enn landsstýrismaðurin, um hvat er vandamikið øki.

§ 13. Hvussu verður hettar býtt, hvussu verður talt hvar ein er?

§ 14. Stk. 2. Hvør skal gjalda munin? Hettar kemur at kosta kommununi nógv meira enn hvat kommunan far inn í náttúrugjaldið.

§ 15. Takið als ikki undir við hesum! Sum sagt so hevur Sumbiar kommuna ikki tíð ella orku til hesa uppgávu. Sostatt far kommunan ikki at góðkenna eina rokning til sín sjálvs.

Vinarliga

Eyðbjørn Thomsen

Borgarstjóri / "brúkari"

Sumbiar kommuna / Sumba